# Tórgarð úti komandi vikurnar

Landsliðsleikarin Dánjal Tórgarð verður ikki við á liðnum hjá H71 komandi tíðina. 19 ára gamli hoyvíkingurin hevur fingið skaða í knæið, sum ger, at hann ikki verður tøkur hjá venjarunum til næstu uppgávurnar. Hann verður tí neyvan við, tá føroyska landsliðið skal royna seg í landsdysti móti Grønlandi mikudagin.



# City bjóðar 894.000.000

Italska AC Milan váttar nú, at enska Manchester City hevur boðið upp á brasilska Kaka, sum fyri einum ári síðani varð kosin heimsins besti spælari. Sambært Sky Italia er talan so ruddiliga um heimsmet fyri ein spælarahandil, sum hesin verður veruleiki. Sjónvarpsstøðin veit at siga, at boðið úr Onglandi er ikki minni enn 120 milliónir evrur – ella 894 mió kr. Samstundis er felagið til reiðar at rinda 35 mió evrur – 260 mió kr. – til ráðgevararnar hjá Kaka, um teir fáa sannført hann um, at fótbóltsframtíðin er í Manchester.

# Frakland, Kroatia og Danmark favorittar

**Spania og Týskland verða eisini spádd at hava ein góðan møguleika. Hjá Noreg og Svøríki ræður fyrst um at vinna seg í millumumfarið**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Hans Lindberg og Mikkel Hansen strekkja út, meðan danska hondbóltslandsliðið leggur seinastu hond á fyrireikingarnar til HM-kappingina í hondbólti*

*Mynd: Jens Dresling/Polfoto*

Í kvøld kl. 19.30 byrjar HM-endaspælið í manshondbólti í Kroatia, tá vertslandið, Kroatia spælir fyrsta dystin ímóti Suðurkorea. Kroatia er ein stór og stolt hondbóltstjóð, og fer liðið at hava eina fanatiska fjøld aftanfyri seg, sum fer at muna í dystum, sum liggja á vippuni. Veddingarfyritøkurnar kring Evropa hava tó Frakland, sum fyrsta favoritt, meðan Kroatia er annar favorittur. Danmark, Spania og Týskland eru triðju favorittar.

Danski landsliðsvenjarin, Ulrik Wilbek hevur meldað út, at hálvfinalan er málsetningurin. Summir spælarar á danska liðnum ivast ikki í, at Danmark vinnur gull. Men eitt lið skal gjøgnum 10 dystir, áðrenn meistaraheitið er heima. 5 dystir í innleiðandi bólkinum, 3 dystir í millumumfarinum, eina hálvfinalu, og so finalan. Alt hetta skal avgreiðast uppá 16 dagar, og tá møði og skaðar fara at gera um seg, so er ikki víst, at finaluliðini verða tey, sum tey flestu spáa. Kasper Hvidt í málinum, Michael Knudsen og Lars Jørgensen verða tríggir ógvuliga avgerandi spælarar hjá Danmark í royndunum at røkka heimstindinum.

## Norðurlond í top 10

Norðurlond eru væl umboðað í HM-endaspælinum. Danmark og Noreg eru enntá í bólki saman, saman við Saudi Arabia, Brasilia, Egyptalandi og Serbia. Flestu hondbóltsserfrøðingar vilja meta, at Danmark, Serbia og Noreg eiga at vinna seg í millumumfarið, men Egyptaland ætlar at hava eitt orð at siga í tí málinum. Norðmenn, sum ikki hava Børge Lund og Frank Løke á liðnum hava ikki tosað líka hart, sum danir um hálvfinalupláss og HM-gull, men hava millumumfarið, sum mál fyri fyrst.

Svenska hondbóltslandsliðið livir í skugganum av svenska íshokkilandsliðnum og svenska fótbóltslandsliðnum, og eru eftirhondini mong ár liðin, síðani Svøríki var eitt stórveldið innan manshondbólt. Frá seinast í 1980-unum til aldarskiftið fór nærum einki EM, HM ella OL-endaspæl framvið, uttan at Svøríki vann gull, silvur ella bronsu. Nú eru málsetningarnir spakari í svensku leguni, og hjá teimum er málsetningurin eisini at vinna seg í millumumfarið fyri fyrst. Svøríki er í bólki saman við Kuwait og Kuba, sum teir eiga at sigra á. Men so mugu teir togast við vertslandið, Kroatia, Spania og Suðurkorea um at vinna sær sætið í millumumfarinum.

## Lættur bólkur hjá Fraklandi

Í bólki C eru Týskland, Russland og Pólland í bólki saman, og haldi tey støðið, so burdu londini ligið oman fyri Algeria, Tunesia og Makedonia. Stór semja er um, at Frakland er komið í tann lættasta innleiðandi bólkin. Frakland er í bólki saman við Australia, Argentina, Slovakia, Ungarn og Rumenia. Oddsini eru høg uppá, at Rumenia og Ungarn skulu vinna HM, og risastór, at Slovakia, Argentina og Australia fremja hetta í verkið.

Væntað verður, at Ungarn og Rumenia fara at fylgja Fraklandi til millumumfarið. Innleiðandi umfarið verður spælt millum 16. og 22. januar. Millumumfarið verður spælt millum 23. og 27. januar. Hálvfinalurnar verða fríggjadagin 30. januar. Og sunnudagin 1. februar verða finalan og bronsufinalan spældar. Miðlahúsið fer at fylgja HM, og tá serliga teimum norðurlendsku londunum.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 18.01 | 14.30 | Neistin-Stjørnan |
| 18.01 | 15.00 | Tjaldur-StÍF |
| 18.01 | 15.00 | VB-Kyndil |

**Atlantic Airways-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 18.01 | 16.00 | Neistin-VÍF |
| 18.01 | 16.00 | H71-Kyndil |
| 18.01 | 16.00 | KÍF-StÍF |

### Flogbóltur

**Eik-ligan kvinnur**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 18.01 | 14.30 | TB-KÍF |
| 18.01 | 15.00 | SÍ-ÍF |

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 11 | 9 | - | 1 | - | 1 | 302 | 227 | 75 | 19 |
| 2 VB | 11 | 8 | - | 0 | - | 3 | 302 | 244 | 58 | 16 |
| 3 Neistin | 11 | 4 | - | 3 | - | 3 | 285 | 271 | 14 | 13 |
| 4 Tjaldur | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 263 | 238 | 25 | 12 |
| 5 StÍF | 11 | 2 | - | 0 | - | 9 | 258 | 327 | -69 | 4 |
| 6 Kyndil | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 173 | 276 | -103 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 11 | 9 | - | 0 | - | 2 | 304 | 280 | 24 | 18 |
| 2 Neistin | 11 | 7 | - | 0 | - | 4 | 330 | 315 | 15 | 14 |
| 3 H71 | 11 | 6 | - | 0 | - | 5 | 293 | 266 | 27 | 12 |
| 4 StÍF | 11 | 5 | - | 2 | - | 4 | 273 | 2730 | 3 | 12 |
| 5 Kyndil | 11 | 3 | - | 2 | - | 6 | 274 | 298 | -24 | 8 |
| 6 KÍF | 11 | 1 | - | 0 | - | 10 | 262 | 307 | -45 | 2 |

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 12 | 11 | - | 1 | 35 | 16 | 19 | 22 |
| 2 Mjølnir | 12 | 8 | - | 4 | 25 | 18 | 7 | 16 |
| 3 Fleyr | 12 | 7 | - | 5 | 25 | 19 | 6 | 14 |
| 4 Dráttur | 12 | 7 | - | 5 | 27 | 21 | 6 | 14 |
| 5 ÍF | 12 | 6 | - | 6 | 24 | 21 | 3 | 12 |
| 6 KÍF | 12 | 3 | - | 9 | 19 | 29 | -10 | 6 |
| 7 TB | 12 | 0 | - | 12 | 2 | 36 | -34 | 0 |